## DAGSINS MEINING

# Fólkatingsval

Fólkatingsval er útskrivað, og kunnu føroyingar í november velja tveir limir á Fólkating. Spennandi verður at síggja, um Tjóðveldisflokkurin fer at bjóða seg fram. Neyvan ber til at taka sæti á Folkatingi, uttan at viðurkenna donsku grundlógina.

Áhugavert verður at síggja, hvussu betongformalistarnir í Tjóðveldisflokkinum fara at forklára hetta. Sambært teirra undarligu tulking uttan hald í veruleikanum, kann man ikki gera nakra skipan innanfyri donsku grundlógina, uttan at stavnsbinda føroyingin til donsku grundlógina í allar øldir og ævir.

Løgið er, um Tjóðveldismenn kunnu ganga við til at formaður floksins, um hann verður valdur á Fólkating, gevur lyfti um at virða eina grundlóg, ið sigur, at Føroyar og Grønland eru partar av danska ríkinum. Gevur formaður floksins hetta lyftið, ja so rýkur tað sindrið av trúvirði teirra alt ella einki útlegging av viðurskiftunum til donsku grundlógina, nakrantíð hevur havt.

Stillar Tjóðveldisflokkurin upp til fólkatingið og kemur inn, so verður neyvan friður eina løtu. Høgni Hoydal kann ikki ynskja sær ein betri platform til at skapa rok og konfrontatiónir enn ein fólkatingsess. Her er tað hundurin liggur grivin. Formalistiska tosið má víkja fyri møguleikanum at sleppa framat rampuljósinum og kunna verða í sjónvarpi og útvarpi í heilum við onkrari nýggjari forferdiligheit um hvussu danska stjórnin vanvirðir føroyingar, altjóða fólkarætt og altjóða mannagongdir í allari almindeligheit. Formaður Tjóðveldisfloksins hevur sera góð evni til at eftirrationalisera eina gongd, so sum málið um Signar á Brúnni eisini vísti okkum. Tað málið kunnu vit venda aftur til eina aðru ferð.

Hesin flokkur hevur í hesum valskeiði víst meira gang enn avrik, og eingin grund er at vænta nakað annað undir núverandi floksleiðslu, óansæð um teir koma á Fólkating ella ikki. Samgongufelagin Fólkaflokkurin hevur hóast alt staðið á odda fyri yvirtøku av Skipaeftirlitinum. Hetta fór fram í allari friðarligheit, uttan at journalistar stóðu uttanfyri fundardyr og ótolnaðust, soleiðis sum vit síggja tað, hvørja ferð Høgni Hoydal fæst við okkurt smávegis. Skipaeftirlitið er hóast alt tað tyngsta økið, ið verður yvirtikið í hesum valskeiðnum. At landsstýrismaðurin so hevur misbrúkt sína støðu til at tvangsflyta Skiapsýnið vestur til sítt egna valdømi er so ein onnur søga.

Óansæð hvat støðan verður, so finst neyvan nøkur betri viðurkenning av okkara ríkisfelagsskapsstatus enn at lata seg velja inn á Fólkating við tilhoyrandi lyfti um, at man virðir donsku grundlógina. Kanska gongur Tjóðveldisflokkurin hóast alt við til eina pragmatiska loysn innanfyri ríkisfelagsskapin, tá teir nú fara at viðurkenna donsku grundlógina við tilhoyrandi orðingum um Føroyar og Grønland. Og ynskir hann at koma í eina samgongu eftir komandi løgtingsval er hann helst eisini noyddur til tað. So hví ikki leggja um longu nú. Hví ikki saðla tann pragmatiska hestin enn einaferð. Soleiðis hevur flokkurin jú saðlað um aftur og aftur eftir kravboðum frá løgmanni. Og í løtuni ger Tjóðveldisflokkurin ikki annað enn at fremja yvirtøkur sambart Heimastýrislógina. Tað var ikki tann hestin hann saðlaði eftir seinasta val.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hvat feilar Eivindi

**- seinasti partur**

**Kári Hansen**
*keypmaður*



Eg havi í tveimum greinum greitt fólki frá um hendan Eivind Jacobsen, hví hann ikki egnar seg til nakað álitisstarv.

Eg dugi sera illa at skilja, at norðingar eru so illa farnir, at onki frægari valevni skal finnast enn hesin maður.

Sum áður greitt frá, keypti Eivind Jacobsen eitt krav frá O.C. Joensen ímóti mær. Hetta kravið var upprunaliga uppá kr 40.672 og stavaði frá ´97. - Eg hevði ongar møguleikar at gjalda kravið tá, men ætlanin var allatíðina at gjalda alla upphæddina aftur.

Í einum av sínum øvundsjúkuherindum, fer Eivind Jacobsen til Niels W. Poulsen Adv. og fær hann at selja sær kravið og pantið í mínum sethúsum. Avtalaður prísur var **22.754,98**

Síðani hevur Eivind Jacobsen, við advokathjálp, roynt at selja míni hús á tvingsilssølu.

Vísandi til eina av blaðgreinum hansara, har hann greiðir frá hvat Sp/f Eivind Jacobsen tekst við, sigur hann soleiðis, citat: "Men hetta er ikki við vinningi fyri eygað. Hetta er fyri at tey feløg og persónar, sum uttan moral, keypa uttan at gjalda, skulu hugsa seg betur um"

Við øðrum eitt slag av "moralens vogter" - ella kalla tað bara dýnulyfting.

Veruleikin er bara tann, at hetta at keypa krøv, við tí einastu grund (chikana) er fulkomiliga ókent í føroyskari søgu.

Eg royndi fleiri ferðir at fáa onkra semju við Eivind Jacobsen soleiðis at hann fekk ta upphædd ið hann hevði lagt út, men nei - hann vildi ikki hava annað enn fullu upphæddina.

**12. Oktober 2001 rindaði eg so Onnu Dam Adv. hjá Eivind Jacobsen 71.529,35. - Útreiðslur til sakførara og onnur gjøld eru 3190, - Vinningur hjá Eivind Jacobsen er 45.584,37**

So kann Eivind Jacobsen billa fólki inn at hann rindar O.C. Joensen avlopið. Hetta broytir tó onki uppá myndina, hógvarnir stinga somikið langt undan.

Eg greiddi eisini frá hvussu Eivind flutti ognir hjá Málingavirkinum í eitt annað felag, meðan hann lat skuldina vera í einum øðrum. Her snýtti hann meg fyri 5-6.000 kr. - Hetta kalla danir fyri "selskabstømning" og er revsivert. - Hetta kann alt samalt prógvast, akkumulatorurin ið málingavirkið bílegði, stendur enn á goymslu okkara.

Hendan greinarøðin er nú komin at enda, eg svari ikki Eivindi aftur, so kann hann skriva so nógvar greinar sum hann vil.

Eftir stendur ein maður sum er: ósannførur, óerligur, ein úlvur í seyðaskinni - ein blanding av heimføðiskapi og øvundsjúku.

# Kanning av framferð í uttanlandsnevndini

**Heðin Mortensen**
*løgtingsmaður*



Heðin Mortensen, løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin hevur send løgmannsstjóranum bræv um kanning av framferð í uttanlandsnevndini og hann vil hava skrivligt svar.

Brævið er soljóðandi:

Góða Súsanna

Í fyrradagin sást á internetinum endurgivin ein frágreiðing frá einum starvsfólki á løgtingsskrivstovuni um fundarboðini, ið limirnir í uttanlandsnevndini fingu í málinum um amerikanskt flogloyvi í føroyskum loftrúmi.

Eg fari tí at biðja teg um eina frágreiðing um mannagongdina fyri slíkar frágreiðingar. Serliga vil eg vita:

- hvør kann biðja um slíkar frágreiðingar?
- krevst ikki, at viðkomandi løgtingsnevnd hevur samtykt at kanna málið?
- krevst ikki, at viðkomandi løgtingsnevnd verður kunnað um kanningina?
- krevst ikki, at viðkomandi løgtingsmaður fær høvi at úttala seg um kanningina og faktiskar upplýsingar í henni?
- hvussu nógvar slíkar kanningar verða gjørdar?
- hvar eru aðrar slíkar kanningar at finna?
- hvør tekur sær av at almannakunngera slíkar kanningar?

Eg fari samstundis at biðja teg seta í verk eina aðra kanning av:

- hvat tingmenn fingu at vita í fundarinnkallingini
- nær einstøku tingmenninir, herundir formaðurin, vóru uppringdir, og hvørji skjøl teir fingu
- hvørji uppskot til svarskriv, formaðurin í uttanlandsnevndini gjørdi
- hvørji onnur skjøl vóru í málinum
- hvat fulla orðaljóðið í svarskrivunum var
- hvat var nevnt í øllum hesum skrivum um aðalorðaskifti ella annað orðaskifti
- hvat var nevnt í øllum hesum um ríkisrættarligu støðuna
- hvussu øll henda framferð samsvarar við tingskipanina og vanliga mannagongd í tingnevndararbeiðinum

Biðið verður um at fáa skrivligt svar.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Sluppu undan verkfalli í evstu løtu

**Heimasjúkrasystrar kring landið fáa nú tænastubilarnar, tær hava stríðst fyri í fleiri ár. Teir høvdu annars fyrireikað seg til at leggja arbeiðið niður, men tað eydnaðist at loysa málið í evstu løtu**

HEIMARØKTIN
*Áki Bertholdsen*

Tað var í evstu løtu, at vit í gjár sluppu undan einum verkfalli, sum hevði fingið sera álvarsligar avleiðingar.

Tað vóru heimasjúkrasystrarnar og heilsusystrarnar kring landið, sum høvdu hótt við at fara í verkfall.

Tað er gamla ósemjan um bilarnar hjá hjá heimarøktini, sum spøkir aftur.

Heimasjúkrasystrarnar hava fyrr verið í verkfalli um hetta sama, tí tær vilja ikki góðtaka, at tær skuldu brúka egnan bil í arbeiðnum.

Tað er til stórt fortreð, at tær hava verið noyddar at brúka egnan bil til arbeiðis, tí tær hava nógv at gera og arbeiðið leggur tí skil hald á bilarnar ein stóran part av tíðini, eisini tá ið tær hava tilkallivaktir, umframt at bilarnar slítast.

Sjúkrasystrarnar hava tí leingi roynt at fáa almannaverkið at útvega teimum arbeiðsbilar.

Nú í hest var tað komið hartil, at tær settu hart ímóti hørðum og høvdu sett 1. oktober sum evsamark fyri, nær bilarnir skuldu verða til taks.

Men tann freistin varð útsett til í gjár, fyrsta november, tí serstovnadeildin hevði boðað frá, at arbeitt var við málinum.

Og best sum tær fyrireikaðu seg upp á at leggja arbeiðið niður, komu boð frá Serstovnadeildini í fyrradagin um, at Almanna- og Heilsumálaráðið nú hevur gjørt at at søkja Løgtingið um eykajáttan at keypa bilar fyri til heimarøktina og heilsusystrarnar.

Jákup Foldbo, leiðari á Serstovnadeildini, sigur, at Almanna -og heilsumálaráðið hevur søkt um eina játtan á eykajáttanarlógini fyri oktober.

– Tilsamans hava vit søkt um eykajáttan til sjey bilar. Teir kosta 100.000 krónur hvør, tá ið mvg er tikið av, so tilsamans hava vit søkt um 700.000 krónur.

Eykajáttanarlógin fyri okbober er enn til politiska viðgerð í Landsstýrinum og enn er óvist, nær hon verður løgd fyri tingið.

Jákup Foldbo sigur, at bilarnir skulu síðani býtast sundur ímillum økini og ímillum heilsusystrarnar og heimasjúkrasystrarnar.

Hann ásannar, at sjey bilar eru ikki nóg mikið til at nøkta allan tørvin og tað kemur eisini at vera so í framtíðini, at tær koma at brúka sín egna bil fyri ein part.

– Men tað er heldur ikki uppleggið, at hvør skal hava sín bil. Hjá nógvum er tað ongin trupulleiki at brúka egnan bil, men hjá øðrum er tað ein stórur trupulleiki. Men bilarnir, sum nú verða keyptir, gera, at heimasjúkrasystrarnar eru ikki so noyddar at keypa egnan bil.

Tær, sum brúka egnan bil, fáa 2,90 kr. fyri hvønn kilometur, tey koyra. Men nú verða samráðingar um at hækka tað gjaldið.



*Heimarøktirnar fáa nú bilarnar, tær hava barst fyri í mong ár. Tær vóru annars til reiðar at fara í verkfall í gjár, men tað varð forða fyri tí í síðstu løtu*

### Álvarsligar avleiðingar

Jákup Foldbo ásannar, at hevði tað enda við, at heimasjúkrasystrarnar fóru í verkfall, hevði tað fingið sera álvarsligar avleiðingar, tí tær hava heilt nógvar sjúklingar, sum tær ganga heim til. Og í summum førum geva tær lívsneyðugan heilvág ella viðgera fólk, sum liggja álvarsliga sjúk heima.

Eftir, hvat skilst, heldur Sjúkrasystrafelagið, at hesir sjey bilarnir eru ein byrjan og tí varð ætlaði arbeiðssteðgurin avblástur.

# 101 Reykjavík

TÍÐINDASKRIV
*Klipp, Filmsfelagi Norðurlandahúsins*

Tíðarrættur íslendskur filmur við rokk og rull. Høvuðspersónur er hin 30 ára gamli Billy Skrøgglíknandi Hlynur.

Triði filmurin í røðini hjá Klipp, Filmsfelagi Norðurlandahúsins, er hin tíðarrætti íslendski ungdómsfilmurin 101 Reykjavík. Damon Albarn og Einar Örn Benediktsson hava lagt tónleikin til rættis.

Tað er listamaðurin og rithøvundurin Hallgrímur Helgason, sum hevur skrivað samnevndu skaldsøguna, sum filmurin 101 Reykjavík byggir á. Hallgrímur er eisini partur av listafólkunum, sum rópa seg "Gullpensilinn" og sýndu fram á Listastevnu Føroya í august í ár.

Tað er hin ungi og evnaríki Baltasar Kormákur, sum hevur leikstjórnað filmin 101 Reykjavík. Miðdepil og høvuðspersónur í filminum er hin Billy Skrøgg-líknandi anti-hetjan Hlynur.

Hlynur er farin um tey 30, men er tó ikki vaksin. Í hvussu er ikki av teirri orsøk. Hann býr hjá mammuni, svevur um dagin og ballast um náttina. Í hugaheiminum hjá Hlyni er eingin áhugi fyri verðini uttanfyri egna postøkið, sum er 101 Reykjavík. Har eru ongar barrir og einki náttarlív.

Hlynur verður tó bráddliga skryktur úr svøvntungu tilveruni. Eftir eina langa nátt í býnum við spansku flamencolærarinnuni Lola, kemur hann eftir, at ikki bara er hon við barn, og at barnið er hansara. Sprelska spanska Lola, er hartil elskarinna hjá mammunu Berglind, sum hevur avdúkað, at hon er lesbisk.

Hetta er fyrstu ferð, at Baltasar Kormákur, sum er ein av hægst mettu íslendsku leikarum, roynir seg sum filmsleikstjóra. 101 Reykjavík er seldur til fleiri lond og hevur millum annað fingið fyrstu virðisløn á altjóða filmstevnu í Toronto, har leikstjórar úr øllum heiminum, ið royna seg fyrstu ferð, vóru við.

Filmsummælarar hava serliga heft seg við framúrskarandi leikararnar, har serliga Hilmir Snær Guðnasson, sum er kendur úr Einglar Alheimsins er sannførandi, tá hann spælir hin ótolandi, men tó sjarmerandi Hlynur.

Tað er spanska stjørnan Victoria Abril, sum spælir hin lívliga Lola, ið setir lita íslendsku stórbýarnæturnar. Abril er javnan við í filmunum hjá Pedro Almodóvar, sum er kendasti spanski filmsleikstjórin.

Íslendski filmurin um Hlyn, Berglind og Lolu, sum búgva innan fyri postøkið 101 Reykjavík , varir 93 minuttir. Í filminum er hópin av tíðarrøttum rocktónleiki, eins og høvið er at síggja mong spennandi støð í íslendska náttarlívinum beint nú.

Filmurin 101 Reykjavík verður sýndur í Norðurlandahúsinum mánakvøldið 5. november klokkan 19:30.



## VIÐMERKINGAR

# Áheitan á Føroya Landsstýri í sambandi við komandi fólkatingsval

**Jenis av Rana**
*løgtingsmaður*



Nú høvi býðst heitir Miðflokkurin á Føroya Landsstýri um at samskipa komandi fólkatingsval við eina fólkaatkvøðu um einvísu ætlan Landsstýrisins um minking av blokkinum. Víst verður í hesum sambandi til uppskot Miðfloksins um fólkaatkvøðu, sum í hesum døgum er til viðgerðar á Løgtingi.

Sambært tí fíggjarlógaruppskoti, sum Landsstýrið hevur lagt fram, tykist vælferð teirra veiku í føroyska samfelagnum hótt, og dagliga berast boð um vána støðuna, sum mong í hesum bólkum liva undir. Tí metir Miðflokkurin framvegis, at einstaki føroyingurin eigur at hava síðsta orðið í einum so týðandi inntrivi í føroyska búskapin, sum í síðsta enda rakar allar føroyingar.